## Buffon ræðist ikki Føroyar



Italski landsliðsmálverjin, Gianluigi Buffon, roknar við, at Italia má arbeiða hart fyri at sleppa til EM-endaspælið. Tað er tó ikki orsakað av dystunum móti Føroyum, at málverjin sigur so. – Estland og Føroyar skuldu verið yvirkomulig hjá okkum, men talan verður um tættar dystir móti Serbia, Slovenia og kanska eisini Norðurírlandi, sigur málverjin. Buffon gleðir seg annars serliga nógv til dystirnar móti Norðurírlandi. Hetta tí fyrsti landsdystur hansara yvirhøvur var ímóti júst Norðurírlandi.

## Terry er týdningarmikil

Landsliðsvenjarin hjá Onglandi, Fabio Capello, sigur, at hóast John Terry ikki longur er liðskipari á enska landsliðnum, so er hann framvegis ein sera týðandi spælari. - Støðan viðvíkjandi John Terry er avgreidd fyri mítt viðkomandi. Men John er framvegis ein týðandi spælari fyri okkum. Og hann er framvegis ein av teimum mest týðandi spælarunum í hópinum, sigur Capello við enska soccernet.

## Verjan alt at siga

Við 15 málum á persónligu kontini hevði Gert Hansen alla orsøk at smílast, tá hann og hinir kollfirðingarnir høvdu vunnið ein sjáldsama stóran sigur á VÍF.

- Hetta var veldugt. Og kenslan er mest sum ótrúlig, nú dysturin er av, segði Gert eftir dystin.

Hvat var tað, sum gjørdi, at tit alt fyri eitt sluppu so væl avstað?

- Fyrst og fremst skjótálopini. Verjan stendur eisini knallgott í fyrra hálvleiki, og tað sigur nógv, at bara 10 mál fara ígjøgnum hjá okkum fyri steðgin.

Er verjan eisini tað, sum hevur gjørt, at tit nú eru við í kapprenningini um finalupláss?

- Vit byrjaðu sjálvandi ikki væl, men eftir at vit hava broytt verjuna til 6-0, hevur tað gingið munandi betur, staðfesti Gert Hansen.

**-mørk**

## Mistøkini kosta

Venjarin hjá VÍF, Jónleif Sólsker, var sjónliga frusteraður eftir dystin í Kollafirði. Ein dystur, har vestmenningar fingu ein sjáldsama stóran avsmurning, og ein dystur, sum staðfesti, at tað kanska ikki er av tilvild, at VÍF í løtuni er niðasta liðið á stigatalvuni.

- Eg veit ikki, hvat tað er, sum gongur galið. Okkara spælarar tóktust uppsettir undan dystinum, men kollfirðingarnir eru sera raskir, og vit fáa ongan tíð fatur á teimum.

- Samstundis gera vit eitt hav av feilum, og Gert er sum eitt fok frameftir vøllinum, meðan okkara als ikki renna aftur. Og tað sleppur tú sjáldan væl frá.

Og við 10 málum á muni í steðginum, so er kanska eingin vegur aftur?

- Tað vil eg ikki siga. Vit fáa tvey skjót mál alt fyri eitt, og vit koma eisini til einar tveir aðrar upplagdar møguleikar. Men so endurtekur søgan seg, og vit misnýta og gera feilir, og so er ikki so nógv at gera, sigur Jónleif Sólsker.

**-mørk**



Gert Hansen hevur her væl fatur í Agnari Joensen hjá VÍF. Hinvegin høvdu vestmenningar so slettis ikki takið á Gert, sum við 15 málum var høvuðsmaður í knúsandi sigrinum hjá KÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

### KÍF-VÍF 40-29 (20-10):

# Illa skølaðir vestmenningar

**Kollfirðingar hølvaðu VÍF av sunnudagin. Og nú tykist FM-finalan verða ein høvuðsstaðaruppgerð, meðan VÍF skal kappast við StÍF um at koma av botnsessinum**




Jákup Mørk

Dysturin varð avgjørdur, mest sum alt fyri eitt, tá KÍF tók ímóti VÍF sunnudagin.

Millum lítið og einki hekk saman hesa løtuna hjá VÍF. Móti væl skipaðu verjuni hjá KÍF fingu vestmenningar bert tvey mál í opnum spæli fyrsta korterið, og hvørki hugflog ella ferð var yvir spælinum.

Og tað gjørdu vertirnar sær dælt av. Mest sum hvørt einasta mistak hjá VÍF varð revsað, og við Gert Hansen sum einmansheri í kontrafasuni vórðu vestmenningar snøgt sagt runnir umkoll. Og tað sigur ikki einki um vestmenningarnar, at teir sjálvir ikki høvdu eitt tað einasta kontraálop undan steðginum.

### Gert í hopla

Gert sjálvur var eitt kapittul fyri seg í dystinum. Fyri steðgin stóð hann fyri heili níggju málum, og hóast málini ikki vóru heilt so nógv í seinna hálvleiki, so helt hann væl og virðiliga støðið. Ikki bara í kontrapartinum, men sanniliga eisini við góðum skoringum av strikuni.

Stóri spurningurin tykist vera, um kollfirðingar hava tað, sum skal til, fyri at standa seg í kappingini um finaluplássið, har Kyndil og H71 nú eru argastu kappingarneytarnir.

Tað er í øllum førum heilt víst, at teir koma at møta sterkari mótstøðu enn henni, sum lítið inspirerandi VÍF-liðið gav teimum í gjár. Men hinvegin hava kollfirðingarnir eisini víst, at teir eru til reiðar at takast við øllum lið í deildini. Og megnar Ognjen Latinovic at halda støðið, sum hann hevði í seinna hálvleiki í gjár, er eingin orsøk at halda, at KÍF ikki kann røkka finaluni. Ein spurningur, sum partvíst verður svaraður tey bæði næstu umførini, tá júst H71 og Kyndil eru mótstøðuliðini.

### VÍF í vanda

Finalan hevur eisini verið tað, sum VÍF hevur meddað eftir, og enn er tað málið ikki púrasta veruleikafjart.

Men fyrst og fremst skal stoltleikin hjá hondbóltsbygdini ansa sær, at liðið ikki dettur úr bestu deildini. Avrikini seinastu dystirnar hava ikki sannført um, at liðið hevur sín sjálvsagda rætt millum tey seks bestu í landinum, og venjingarstøðan hjá spælarunum tykist heldur ikki borga fyri, at til ber at stríða seg úr núverandi støðuni.

Í so máta verður talan um lyklauppgerð, tá VÍF seinast í hesum mánaðinum eigur heimadyst móti StÍF.

## FAKTA

**KÍF-VÍF 40-29 (20-10)**
**10 min**: 8-3
**20 min:** 14-8
**40 min:** 24-15
**50 min:** 32-23
**Málskjúttar**
**KÍF:** Gert Hansen 15, Niklas Reginsson 6(1), Rógvi Weyhe 5, Teitur Joensen 3(1), Tony Weyhe 3, Andrias Nielsen 2, Regin Petersen 2
**VÍF:** Sámal Joensen 8(4), Bjarti Hansen 6, Regin Joensen 5, Áki G. Olsen 4, Rúni Fossdal 2, Agnar Joensen 2(2), Sjúrður Poulsen 2
**Brotskøst:** KÍF 6, VÍF 6
**Útvísingar:** KÍF 4, VÍF 9
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen